gult cyan magenta svart



## HEILSANIR



Vit vilja ynskja ætt, vinum og kenningum eini gleðilig jól og gott nýggjár, við tøkk fyri brátt farna ár.
**Tór-Eilif og Ingi Pauli**



Eg og mamma takka hjartaliga øllum tykkum, sum gjørdu mær konfirmatiónsdagin 01.10.2000 so minnisríkan. Takk fyri alla ta góðu hjálpina vit fingu. Gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.
**Rannvá Ziska Jensen**



**Góði John**
Hjartaliga tillukku á 17 ára degnum, vit gleða okkum til í kvøld. Heilsan vit øll.
**Mamma og babba**



Hesin fitti gubbin hjá mær fyllir 17 ár í dag. Eg vil ynskja honum tillukku, og gleði meg at sleppa at sita á knallert hjá honum.
**Heilsan lítla Ása**



Ja her slappar tú væl av tá tú ikki ert úti við báti, men tillukku við 70 ára degnum, sum var hálvan november og nógv góð ár í framtíðini.
**Ynskja kona og børn**



Hjartaliga takka vit øllum, sum gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 21. oktober 2000. Tøkk fyri gávur, telegramm og hjartans tøkk øll tit, sum hjálptu okkum. Eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár, ynskja vit øllum.
**Heilsan Birte og Rúni**



Sjálvt teir bestu kunnu fáa stød.



**Góði Eyðun**
Tillukku við próvnum. Eisini ein heilsan til Áslu.
**Vit øll í Hvalba, Linda**



Elin, tillukku við degnum sum var tann 16.12.
**Heilsan húskallurin úr Suðri**



**Góðu vallaravinir!**
Eg takki tykkum øllum fyri sera gott ferðalag á Íslandstúrinum í juni. Gleðilig jól og gott nýggjár øll somul (og ansið nú eftir foxinum).
**Bette**
*Á myndini: Hildur, Gestur, Guðbjørg, Kristina, Dinna, Margretha, Gunnvør, Bergljót, Lilja, Súni, Bette, Jesmar, Nigro og Kristin.*

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:........................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: ...................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**



## TILTØK

**Ebenezer**
Sunnudagin, jólaaftan, kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 15 barnamøti.
1. jóladag kl. 18 evangel. møti har útisetar luttaka.
2. jóladag kl. 18 evangel. møti har sjómenn luttaka.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 21 ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin 28. kl. 17 í KFUK: Jólaveitsla fyri børn. Gimmi Olsen vitjar okkum.
Fríggjadagin 29. kl. 19.30 í KFUK: Jólaveitsla fyri vaksin. Inngangur við Hans Jacob Joensen, bispi.

**Rhema á Hálsi**
Jólaaftan kl. 15.30 verða jólini sungin inn. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Jólaaftan kl. 17 Gudstænasta, major Inger Sofie Tjåland talar.
Jóladag kl. 11 hátíðarmøti, Palli Petersen talar, hornmusikkur.
2. Jóladag kl. 16 almenn jólaveitsla fyri børn.
Hósdagin 28. kl. 17 almenn jólaveitsla fyri vaksin.
Nýggjársaftan kl. 11 møti.
Gleðilig jól.

**Saron, Vestmanna**
2. Jóladag kl. 11 morgunmøti.

**Ørkin, Saltangará**
Einki møti verður um jólini. Møti verður aftur í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini sunnudagin 7. januar.
Vit eru við í tiltakinum í Ítróttarhøllini í Runavík 2. jóladag.

### 75 ÁR

Fríggjadagin 22. desember verður Doretha Jacobsen, Fuglafjørður, 75 ár. Dagurin verður hildin hjá soninum Hans Martin Jacobsen eftir kl. 20.30.

### BRÚDLEYP

Leygardagin 30. des. kl. 17.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Anita Toftum Ragnarsson og Birgir Svøðstein, bæði úr Klaksvík. Veitsla verður fyri innbodnum í Skálanum.

Leygardagin 6. januar kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Lis undir Kletti og Hans Jákup Ferja. Vælkomst verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at boða frá í seinasta lagi fríggjadagin 22. des. á tlf. 316015, 312426 ella 422116.

Leygardagin 30. des. giftast í Avedøre kirke, Guðrið Jákupsdóttir Joensen, Tórshavn og Jan Forná, Tvøroyri. Brúdleypsadr: Grønbækvej 44, 2650 Hvidovre.

### SILVURBRÚDLEYP

Tann 27. des. kunnu hjúnini Regin og Odfríð Hansen halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Fútalág 12. Øll eru vælkomin.

Hósdagin 28. des. kunnu Margretha og Finn Christiansen, Reynsgøta 35, Argir, halda silvurbrúdleyp. Tey eru at hitta heima fyrrapartin frá kl. 7-12.

### GULLBRÚDLEYP

Nýggjársaftan hava hjúnini Palma og Bjarni Dal-Christiansen gullbrúdleyp. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið eru vælkomin í J. Paturssonargøtu 30 millum kl. 9 og 14.

**Missiónshúsið, á Tvøroyri**
Jólaveitslan fyri børn í øllum aldri verður 2. jóladag kl. 16.00. Kortini verða savnaði inn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mikukvøldið 27. kl. 18.00 jólafundur-jólahugni.
Hósdagin 28. des. kl. 18 jólaveitsla fyri børn í bygdarhúsinum í Lopra.

**Sion, Vágur**
Einki møti verður sunnudagin.
Telefonandaktin: 373777.

**Betel, Vágur**
Jólaaftan kl. 11 breyðbróting, kl. 17 evangel. fundur.
Jóladag kl. 18 evangeliskur fundur
2. Jóladag kl. 18 evangeliskur fundur.
Leygardagin kl. 15. Nýársveitsla fyri børn, kl. 19 vaksin.
Nýggjársaftan kl. 11 breyðbróting, kl. 23 bønarfundur.
Nýggjársdag kl. 18 evangel. fundur.
Ónsdagin 3. kl. 20 bønarfundur.

**Betania, Skopun**
1. jóladag familjumøti kl. 11.
2. jóladag kl. 16 jólaveitsla í Samljóð.
30. des. nýggjársveitsla í Betania kl. 19.
Nýggjársdag kl. 17 jólaveitsla í Zion. Verið vælkomin.

**Zion, Sandur**
Nýggjársdag kl. 17 jólaveitsla. Verið vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagur 18.12.*
kl. 10-12 Opið hús
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til kalda borðið mikudagin tlf. 316491
*Týsdagur 19.12.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Halgan stundar til. Nicolina Jensen Beder
*Mikudagur 20.12.*
kl. 10 Fyrireiking til kaltborð
kl. 12 Kaltborð
*Hósdagur 21.12.*
kl. 10-17 Opið hús
*Fríggjadagur 22.12.*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Konsert. Dreingjakórið Undir Brúnni.
*Tilhaldið verður afturlatið 22.12. og letur uppaftur mikudg. 3/1-01. Vit takka fyri ta stóru undirtøku, sum Tilhaldið hevur fingið og ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og eitt gott nýar.*

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20-21.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

**Javni N. Finsensgøta 32**
Mánadag stongt.
Týsdag, mikudag og hósdag opið kl. 11-14
Fríggjadag kl. 11-15
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo


